UPPGÁVA 2Ð

## Smágenta deyð í ferðsluvanlukku

Tit skulu gera eina søgu um vanlukkuna

- Byrjið við at lesa greinastubban um vanlukkuna
- Persónarnir í vanlukkuni eru persónarnir, sum tit hava gjørt
- Tit skulu greiða frá, hví kvøldið hjá teimum endaði soleiðis

**Søgan, sum tit gera, skal svara hesum spurningum:**

- Hvør koyrdi prutlið?
- Hvør sat aftanfyri?
- Hví vóru tað júst hesir persónar, sum vóru á prutlinum?
- Hví koyrdu tey so skjótt?
- Fingu tey á prutlinum skaða?
- Vóru tey í hjálmi?
- Hví snaraði smágentan út fyri prutlið?
- Hvønn leiklut spæla hinir báðir persónarnir, sum ikki sótu á prutlinum?
- Hvat kundu teir gjørt?

Søgan skal passa til teir fýra persónarnar, sum tit hava gjørt.

### Smágenta deyð í ferðsluvanlukku

Týskvøldið kravdi ein syndarlig ferðsluvanlukka eitt lív, tá ið eitt prutl við tveimum 15 ára gomlum rendi á eina smágentu. Smágentan varð beinanvegin flutt á Landssjúkrahúsið, men hon doyði av løstunum. Gentan var 6 ára gomul.

Vanlukkan hendi, tá prutlið skuldi yvirhála gentuna, sum var á súkklu. Hví prutlið rakti gentuna, er enn óvist. Løgreglan metir, at prutlið koyrdi 60-65 km/t, og møguliga hevur smágentan snarað út fyri prutlið.

Nøkur vinfólk høvdu putlast við prutlið, áðrenn vanlukkan hendi. Tvey teirra settu seg síðani á prutlið, eftir øllum at døma fyri at síggja, hvussu skjótt prutlið kundi koyra.

betri
RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK